## Palermo bjargaði Argentina

Við einum máli í yvirtíðini syrgdi veteranurin, Martin Palermo, fyri, at Argentina framvegis hevur vónina um at vinna seg til HM-endaspælið í fótbólti. Málið gjørdi nevnliga, at Argentina vann 2-1 á Peru, og nú stendur Argentina seg, um teir megna at spæla javnt í seinasta dystinum, sum er á útivølli móti Uruguay. Og sum tað sæst á myndini, so var argentinski landsliðsvenjarin meira enn fegin um málið.



## Ronaldo úti næsta mánaðin

Talan var um dýran sigur, tá Portugal leygardagin vann 3-0 móti Ungarn. Cristiano Ronaldo hevði verið ivasamur undan dystinum, men hann segði seg kortini vera kláran at spæla. Men tað var ikki leingi, áðrenn økulin aftur gav trupulleikar, og nú eru boðini úr Real Madrid, at heimsins dýrasti spælari ikki spælir aftur næsta mánaðin. Eftir øllum at døma er talan um sama skaða, sum noyddi Ronaldo av vøllinum í Champions League dystinum móti Marseille.



Hesir fýra eru tøkir mikukvøldið og harvið hevur Brian Kerr 22 mans at velja í millum

Mynd: Rólant Waag Dam

# Saknur var í teimum

**Tilsamans 110 landsdystarroyndir. So nógv ríkari er hópurin hjá Brian Kerr undan dystinum í móti Rumenia, nú Jákup á Borg, Símun Samuelsen, Christian Lamhauge Holst og Einar Hansen hava sitið leikbann av sær**




Rólant Waag Dam

Piatra Neamt, Rumenia: Teir fýra byrjaðu allir sum ein inni í sigrinum móti Litava. Teir somu fýra sótu allir uttanfyri leygarkvøldið.

Jákup á Borg er tann leikarin við næstflest royndum á føroyska landsliðnum. Mikukvøldið kann hann spæla sín dyst nummar 60. Tilsamans eru teir fýra leikbannaðu leikararnir seinasta dyst skrásettir fyri heili 110 landsdystir.

Umframt hesar royndir, er eisini talan um nakrar mans, sum hava verið ógvuliga væl koyrandi seinastu tíðina. Bæði á landsliðnum og í heimligu deildini.

Harumframt hava bæði Símun Samuelsen og Christian Lamhauge Holst nakrar royndir frá Íslandi og Danmark, sum eru rættiliga nógv verdar í landsliðssamanhangi.

### Góðir undir venjing

Hóast teir fýra ikki vóru tøkir leygarkvøldið, hava teir vant eins hart og nógv og hinir. Undir hesum somu venjingum hevur Jákup á Borg víst seg at vera serstakliga væl fyri, meðan hinir tríggir eisini hava verið sannførandi.

Tað vil siga, at teir higartil hava gjørt sítt at sannføra Kerr um, at teir skulu hava pláss á liðnum mikukvøldið.

### Tríggir fyri fyrstu ferð

Fyri Jákup á Borg er hetta við leikbannum annars ikki nakað nýtt sum so. Hinvegin hava hvørki Símun Samuelsen, Christian Lamhauge Holst ella Einar Hansen verið leikbannaðir á landsliðnum áður.

Hvat Símuni Samuelsen og Christian Lamhauge Holst viðvíkur, er hetta áhugavert. Báðir hava nevniliga verið partur av landsliðshópinum í seks ár, men hetta er fyrsta leikbannið, teir hava rent seg í.

Í so máta var Einar Hansen kvikari. Hann spældi sín fyrsta landsdyst í 2007. Um hann kemur at spæla dyst nummar níggju mikukvøldið, fer tíðin at vísa. Í øllum førum var saknur í honum og hinum á vøllinum leygarkvøldið.



Tveir eysturoyingar á flogvøllinum í Brest í Frankaríki fyrrapartin í gjár

Mynd: Rólant Waag Dam

# Drúgv og góð ferð

**Góðar seks tímar tók tað landsliðnum at ferðast frá Frankaríki til Rumenia. Talan var tó um ein góða ferð**

Piatra Neamt, Rumenia: Føroyska ferðalagið heldur til í rumenska býnum Piatra Neamt.

Býurin liggur 350 kilometur norðan fyri høvuðsstaðin Bukarest, og 60 kilometrar frá nærmasta flogvøllinum, sum liggur í býnum Bacau. Í Piatra Neamt búgva beint omanfyri 100.000 fólk.

Landsliðið fleyg beinleiðis úr Brest í Frankaríki til Bukarest í gjár. Hesin túrurin tók smáar fýra tímar, og úr Bukarest varð flogið til Bacau. Ein túrur, sum tók ein hálvan tíma.

Síðani var føroyska ferðalagið eskorterað av løgregluni teir 60 kilometrarnar til Piatra Neamt.

### Hava vant tvær ferðir

Klokkan var farin av sjey, tá føroyska ferðalagið var frammi á hotellinum, men her tók Brian Kerr menn sínar út á vøllin so at siga beinanvegin, soleiðis at hesir fingu rørt seg eitt lítið sindur eftir longu ferðina.

Og hóast langa ferð sluppu leikararnir ikki at sova leingi. Klokkan 10.30 í morgun var landsliðið aftur á venjingarvøllinum, sum liggur beint við Ceahlaul Stadium, har dysturin skal spælast mikukvøldið.

rólant